Gene Hackman heiðraður

Vælkendur er hann, Gene Hackman. Hann hevur spælt við í einum ótali av filmum gjøgnum fimm tíggjuár. Nevnast kunnu millum aðrir Bonnie and Clyde, Young Frankenstein, Superman, Enemy of the State og Behind Enemy Lines. Hetta eru bert nakrir heilt fáir av teimum kendastu filmunum, sum Gene Hackman hevur spælt við í.

Nevndin, ið umsitur Cecil B. DeMille heiðursløna, hevur avgjørt, at Gene Hackman verður hann, sum fær virðisløna hesuferð. Hackman er nú 72 ára gamal, og tá Golden Globe verður, verður hann samstundis heiðraður fyri hansara ískoyti til filmsheimin tey seinastu mongu árini.

Onnur, ið hava fingið hendan heiðurin, eru: Harrison Ford, Al Pacino, Dustin Hoffman, Shirley MacLaine, Jack Nicholson, Sean Connery og Sophia Loren.

Hóast hann nú má sigast at vera komin fitt upp í árini, so er Hackman júst nú í ferð við at spæla ein film inn, sum eitur The Runaway Jury. Her spælir hann saman við John Cusack og Dustin Hoffman.

Golden Globe handanin nærkast

Hollywood ger seg kláran til eina av teimum heilt stóru hendingunum, sum áltið plaga at savna eina rúgvu av kendum stjørnum saman. Nevniliga Golden Globe virðislønahandanin. Hóast hon ikki er Oscar, so stendur heiðurin av at fáa eina Golden Globe onki aftan fyri Oscar standmyndina.

Uppskotini til eina Golden Globe eru í tveimum høvuðsbólkum, sjónvarp og filmar. Í bólkunum eru so aftur teir ymisku undirbólkarnir, har vinnarin so verður kosin.

Fimm uppskot eru til besta filmin og teir eru: About Schmidt, Gangs of New York, The Lord of the Rings: The Two Towers, The Hours og The Pianist.

Millum leikararnar, sum eru í uppskoti til at vinna ein Golden Globe eru, Jack Nicholson, Leonardo DiCaprio og Daniel Day-Lewis og Nicole Kidman, Salma Hayek og Meryl Streep.

Tá tað kemur til sjónvarp, so er tað mest áhugaverda nokk, hvør sending verður kosin at vera tann besta. Tær, sum eru í uppskoti, eru: Innan drama The Sopranos, Alias, Six Feet Under, CSI: Crime Scene Investigation og The West Wing, meðan tær innan skemt eru: Curb Your Enthusiasm, Friends, Sex and the City, The Simpsons og Will and Grace.

Hvør verður besti filmur, og hvør fer heim við einari Golden Globe verður greitt, tá handanin fer fram í Beverly Hilton Hotel tann 19. januar.

Ríka Catherine Zeta Jones...

Sjónleikarakvinnan Catherine Zeta Jones, vinnur pening sum ongantíð fyrr. Væntast kann, at tað verður ikki longi til hon fer at eiga fleiri pengar enn maðurin, tann so víðagitni Michael Douglas. Catherine hevur fingið fleiri avbera góð tilboð um at gera filmar, men harafturat hevur hon so eisini fingið eitt tilboð frá einum kasino í Las Vegas. Ætlanin er, at hon í leypi av trimum mánaðum skal hava einar 70 framførslur. Aftur fyri hetta fær hon 85 milliónur krónur. Enn hevur Catherine ikki svarað, tí hon hugsar seg um. Men hon hevur góðan hug til at fáa gongd í eina møguliga sangkarrieru, og skuldi hetta tilboðið verið ein rættiliga áhugaverd byrjan - sigst...

Julia Roberts sjúk

Tann nýgifta Julia Roberts fekk stutt eftir brúdleypið hjá sær og manninum, Danny Moder, staðfest eina bløðarasjúku. Henda sjúkan kann millum annað hava við sær, at hon lættliga kann fáa innvendigar bløðingar í húð, slímhindum og maganum.
Sjúkan er varandi, men hon kann tó viðgerast við kortison ella skurðviðgerð.

Box office topp skorarar í januar

1.	The Lord of the Rings: The Two Towers	$25,017,279
2.	Catch Me If You Can	$21,142,434
3.	Two Weeks Notice	$11,126,397
4.	Maid in Manhattan	$8,621,757
5.	About Schmidt	$8,533,162
6.	Gangs of New York	$7,327,177
7.	The Wild Thornberrys Movie	$5,510,465
8.	Drumline	$5,303,002
9.	Chicago	$4,964,938
10.	Harry Potter and the Chamber of Secrets	$4,653,389

Halle Berry vil hava Denzel

Nú frættist, at James Bond diddan, Hally Berry, er vorðin troytt av manninum hjá sær. Nú hevur hon fingið eyga á tann so vælkenda Denzel Washington. Tað sigst, at Halle er púra ør eftir honum. Um tað er umvent eisini, sigur søgan so onki um, men Denzel Washington og konan nærkast teirra 20 ára brúdleypsdegi. So um tað fer at verða til nakað millum Halle Berry og Denzel Washington - tað kann bara tíðin vísa...

Triðju ferð Harry Potter

Ikki er Harry Potter tikin niður av veggunum í øllum biografunum kring heimin, áðrenn tosið um trý-aran longu er byrjað.
Næsti filmur í røðini er Harry Potter and the prisoner of Azakaban. Warner Bros hevur gjørt av, at partar av filminum skulu takast upp í skotska hálandinum. Staðið, sum er valt út til upptøkurnar, er Clencoe. Og tað verður so karmur um triðja skúlaárið hjá Harry Potter.
Eini 400 fólk fara at luttaka í upptøkunum, sum byrja longu í februar og halda fram til mei næsta ár.
Warner Bros hevur søkt um loyvið at byggja filmsettið í Glencoe í Skotlandi. Tað fer at geva tí lokala ídnaðinum eitt ískoyti áljóðandi tríggjar milliónir pund.

Tað er annars ikki fyrstu ferð, at hetta staðið verður nýtt til filmsupptøkur.

Í 1995 bleiv Braveheart, sum Mel Gibson leikstjórnaði og leikti høvuðsleiklutin í, tikin upp har.

Jennifer og Ben skuldu giftast

Ársins brúdleyp í Hollywood verður fyribils ikki av nøkrum. Tey bæði Jennifer Lopez og Ben Affleck høvdu sett Valentines Day, 14. februar, til teirra brúdleypsdag, men nú frættist frá teirra vinum, at brúdleypið er útsett. Og tað er ongin annar enn besti vinurin hjá Ben, Matt Damon, sum er komin millum parið. Ikki soleiðis at skilja, at hann og Jennifer eru blivin ov væl, heldur tvørturímóti. Hon kann ikki tola Matt, og hon hevur sagt við Ben, at hann má velja millum seg og Matt, tí hon tolir hann stutt sagt ikki.

Ali G: Indahouse

Hann er nakað fyri seg hesin Ali G. Nógv kenna hann óivað frá hansara sjónvarpssendingum, har hann ikki er smæðin fyri at siga sítt við kend og ókend. Hann hevur eitt nú fingið sjálvan Mohammed Alfayed at rappa um sítt lív.

Nú er ein filmur eisini gjørdur um fyribrigdið Ali G, sum er sjónleikarnavnið hjá einum bretskum sjónleikara. Filmurin er mær vitandi ikki heilt nýggjur, men tað kann so gera tað sama í hesum førinum.

Filmurin mest av øllum um Ali G. Tað er ikki nógv handling, men nógv av Ali G. Hann er kendur fyri at ver a grovur í munninum, og hann livir upp til sítt umdømi í filminum. Hann heldur ikki aftur við at spilla ein og hvønn út.

Tey flestu vita væl, áðrenn tey síggja filmin og áðrenn hesar reglur verða lisnar, hvussu ein filmur við og um Ali G er.

Filmurin fylgir einum ráki innan ungdómsfilmar, sum eftir øllum at døma vinnur fram á báðum síðum av Atlantshavinum. Rákið innan ungdómsfilmar er tað, at alt støðugt gerst meira og meira grovt. Tað verður ikki hildið aftur við "toilet humorinum", og mestsum hvør einasti setningur snýr seg um sex, undirlív og annað gott. Hetta kann mann so dáma ella ei. Er stemningurin í salinum góður, kann filmurin vera stak skemtiligur í støðum, men intellektuelt avbjóðandi ella stimbrandi heilaføði er ikki nógv at koma eftir, tá Ali G er á skiggjanum.

Lívið hjá Ali G og harvið filmurin snúgva seg fyri tað nógva um sex og hvussu kynslimurin á besta hátt kann røkjast.

Søgan er tann, at bretski forsætisráðharrin er í trupulleikum. Hann er ógvuliga illa umtókur millum ungu veljararnar, og hann vil tí hava fatur á einum ungu valevni. Varaforsætisráðharrin ynskir sjálvur at røkka ovastu rók, og hann finnur so tann vánaligasta og tápiligasta mannin at stilla upp fyri flokkin í einum tryggum valdømi. Og hesin maðurin eitur sjálvandi Ali G.

Við einum ynski um at varðveita eina miðstøð fyri ung fer Ali G glaðbeintur inn í politikk. Tá tað so vísir seg, at argasti kappingarneytin hjá honum hevur nakað nær kynsliminum hjá einum hesti (jú, hetta er veruliga tað, filmurin snýr seg um, og tað sigur ikki so lítið), so slóðar hetta fyri, at Ali G verður valdur í bretska parlamenti. Hansara "Keep it real" verumáti vekjur ans allastaðni, hann kemur, og við eitt er Ali G at finna í bretsku stjórnini.

Á henda hátt fáa bæði vøkur ung kvennmenni millum mongu innflytararnar uppihaldsloyvi.
Meira skal ikki sigast um søguna her.

Filmurin er rættiliga frískur og nýggjur í stilinum, hóast tónleikurin av einari ella aðrari orsøk er nøkur ára gamal.

Ali G ynskir sær meira enn nakað annað at eins skrappur og fólk í ghettoini í Los Angeles.

Hetta sama ynskir filmurin eftir øllum at døma eisini. Stílurin er ikki til at fáa fatur á, men tað er ger heldur ikki so nógv, tá prátið um kynslimir og "Doggy style" er endaleyst.

Við einum opnum sinni, kann filmurin vera ógvuliga skemtiligur í støðum. Hann roynir heldur ikki at spæla seriøsur, men tað er fult út satiru kendur allan vegin.

Áskoðararnir, tá Sosialurin vitjaði kykmyndahøli, vóru øll ung fólk, og filmurin er eisini burturav gjørdur til hetta ættarliðið.

Einki verður hildið heilagt. Um tað er kynshárini hjá drotningini ella gleðin av samkyndum kynsligum royndum er eitt feitt hjá Ali G.

Alt í alt fær filmurin við og um Ali G ikki nakað fløvandi skoðsmál herfrá. Tað er bara gott fyri filmin, at vit ikki hava ein stiðja at geva skoðsmál eftir.

Ali G er fúlur og frekur, og eisini oftani stuttligur. Men hvat er at fara ov langt, og hvat er ein minstamark, kann ein spyrja seg sjálvan.

Heri á Rógvi

fakta um Ali G - Indahouse

leikarar:	ali g og onnur
longd:	110 min.
stað:	havnar bio, um tú ert 12 ár ella eldri

Ung orð: Góðan morgun, Føroyar!

»Útvarp Føroya, góðan morgun«. Klokkan er farin av sjey, og útvarpið er longu frá. Nógv fyri. Tað er soleiðis hvønn morgun áðrenn eg skal í skúla. Útvarpið MÁ frá. Og so skulu vit plágast við tíðindum og øðrum tvætli áðrenn man yvirhøvur hevur fingið eygu. Typiskt foreldur. Hasum eru tey uppvaksin við, og soleiðis má tað helst bara vera. Men hvør veit, kanska eg sjálv eisini verði soleiðis tá eg verði eldri.

Líkamikið. Tað er kanska ikki vert at øsa seg um.



Bussførarin tykist eisini at vera útvarpstilhangari. Útvarpið er eisini frá har. Áh nei, tað kann ikki vera rætt. At ein veruliga skal verða togaður ígjøgnum hálvan annan tíma, við at lurta eftir hasum vertinum. Hann skal altið vera so stuttligur og í so góðum lag. Morgungronin nærkast bara. Og hetta myrka veðrið ger tað ikki betri. Tíbetur er tað ikki so langt til skúlan.

Bussurin koyrir víðari og vit skulu ígjøgnum morgunsang og lítlar anekdotur, sum útvarpsverturin hevur upplivað, sum hann heldur er "áh so stuttligt". Neinei, morgungronin er eitt stig nærri. Tað er stuttligt hóast alt at síggja, hvussu troytt og lin øll eru um morgnarnar. Onki lív er í bussinum. Tey flestu sita við eini bók ella onkrum skúlatingum, sum tey ikki hava gjørt kvøldið fyri. Og útvarpið spælir framvegis í bakgrundini, og sjenerar ikki tey tað heilt stóra...

Hoyr, nú var endiliga ein góður sangur í Útvarpinum... tralalalala...

Endiliga - skúlin! Bjarga mær vekk frá hesi útvarpssendingini áðrenn eg kvalist!

Tíbetur hava vit onki radio í skúlastovuni, so kanska eg sleppi so nøkunlunda heilskapað ígjøgnum dagin.

Tá man so kemur heimaftur, so er tað lítlibeiggi. Hann elskar Rás 2. Juhuuu, hvat er so kul? Allar útvarpsstøðir skuldu verið niðurlagdar um tú spyrt meg.

Og so ikki at gloyma á náttturða. Tað ber ikki til at hoyra mannamál, tí at tíðindini eru tað týdningarmesta kring borðið hesa løtuna. Og hvat so???? Tey hava hoyrt alt ígjøgnum dagin, minst 100 ferðir. Nei, heilt erligt - onkur burdi tikið seg saman.

Huff, puff. Men gott er. Tað er ikki so galið kortini. Tí um onki útvarp var, so skuldi eg funnið útav at grenja um tað. So tað kann ikki vera so heilt av leið, ha?

Anna